# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Fyri 35 árum síðan

Leygardagin 25. januar 1975 skrivar Sosialurin um at ætlanin er at stovna eitt felag, sum skal standa fyri bygging av eini skipasmiðju og sleipistøð í Sunda kommunu. Tað er Jógvan Olsen, skipasmiður í Klaksvík, sum saman við Jaspuri Kruse og fleiri á Eiði, sum arbeiða við hesum ætlanum. Tað eru tvey pláss í Sunda kommunu at velja ímillum. Annað er við Norðskála og hitt er á Oyrarbakka.

Í sambandi við at nýtt útvarpshús skal byggjast, saknar Johan Mortensen, tíðindamaður, eitt kjak um útvarpið. Hann skrivar, at tað er at vóna, nú vit fáa nýtt útvarpshús, at útvarpsmyndugleikarnir gera sítt til, at framstig verða gjørd, og at útvarpið verður meira tíðarhóskandi. Útvarpið sendi tá bert um morgunin, á middegi og á kvøldið til umleið kl. 20.

Blaðið skrivar eisini, at upptøkurnar av Føroya filminum Rannvá verða lidnar næsta týsdag. Filmurin, sum verður liðugur í mars, hevur eina spælitíð upp á tveir tímar við føroyskari talu og tónleiki eftir Sibelius. Nøkur av teimum leikandi eru: Finnur Johansen, Elin Mouritsen, Guðrið H. Nielsen, Jørleif Kúrberg, Róland Samuelsen, Mortan Carlsen, Anna Maria Petersen, Hanna Joensen, Fraser Eysturoy, Asger Ásgeirsdóttir, Heri Haraldsen, Noomi Jul, Eydna Joensen, Fanny í Dali og Flóvin Jacobsen.

Á forsíðuni stendur um Spesialskúlin, sum verður bygdur á Frælsinum, verður liðugur fyrst í komandi ári.


Spesialskúlin liðugur fyrst í komandi ári
Síða 12

sosialurin

frælsi javnaður bróðralag

Nr. 7 — Leygardagin 25. januar 1975 — 48. árgangur — Leysasøla 1,50 kr.

í dag

Landsbankin

Skipasmiðja og sleipistøð í Sunda kommunu

Sinnaðir at lata landi

Upptøkurnar lidnar næsta týsdag

Væntandi verða upptøkurnar av spælifilminum Rannvá, sum Miguel Hidalgo í Havn stendur fyri, lidnar næsta týsdag. Men alt veltst um veðurlíkindini.

Miguel roknar við, at filmurin verður klárur at vísa fyrstu ferð einaferð í mars mánaða. Í filminum luttaka 50 fólk.

*Á myndini eru Elin Mouritsen og Finnur Johansen í leiklutinum sum Rannvá og pápi hennara Tórur*

## Rutuflogfarið út av breytini í 1975

Tá Danair rutuflogfarið úr Danmark skuldi lenda á flogvøllinum á Vágum 25. januar 1975 vildi so illa til, at flogfarið ikki fekk steðgað vegna hálku á flogbreytini.

Flogskiparin varnaðist ikki, at breytin var hál, fyrr enn flogfarið nærkaðist endanum á flogbreytini.

Hann gjørdi tí av at snara í bakborð út av vøllinum og niðan í hagan. Flogfarið steðgaði einar 25 metrar frá breytini. Skaðin var so stórur, at flogfarið varð ikki sett í stand aftur. Eingin mansskaði hendi av óhappinum.

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1975*



## Merkisdagar

**60 ára føðingardagur**
Mánadagin 25. jan. fylti Jóna Borg Dahl, í vági, 60 ár. Dagurin verður hildin í Billardhúsinum leygardagin 30. jan. frá kl. 13 til 17, har øll eru vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
1. feb. verður Hans Poulsen, Klaksvík, ættaður av Eiði, 80 ár. Føðingardagurin verur hildin 6. feb. hjá dótturini í Kristiansgøtu 37, Hoyvík frá kl. 17.

**90 ára føðingardagur**
Hósdagin 28. jan. fyllir Eigil Gunnarsson í Havn 90 ár. Føðingardagurin verður hildin í hølunum hjá Starvsmannafelagnum, J. H. Schrøtersgøta. 9, frá kl. 16-20, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**90 ára føðingardagur**
Sunnudagin 31. jan. fyllir Anna Louisa Jacobsen í Skálafirði 90 ár. Dagurin verður hildin í Kelduni í Skálafirði frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin!

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 2. feb. hava Jóhan Petur S. og Lis Olsen silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í kafeteria í Kelduni í Skálafirði týskvøldið 2. feb. frá kl.18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
Fríggjadagin 29. jan. hava Ingibjørg og Olfert Debes á Oyri gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við familju, leygardagin 30. jan.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 30. jan. hava hjúnini Anny og Pole Klein, Vestmanna, gullbrúdleyp. Tey, ið vilja heilsa uppá gullbrúðarparið, eru vælkomin millum kl. 11 og 15 til morgunmat í kaffistovuni inni á Fjørð.

**Gullbrúdleyp**
31. jan. hava hjúnuni Sonja og Hans Olaf Andersen í Lopra gullbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

**Diamantbrúdleyp**
Fríggjadagin 5. feb. hava Aðalbjørg og Sigurd Joensen í Oyndarfirði diamantbrúðleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík leygardagin 6. feb., kl. 15, har øll eru hjartaliga vælkomin.

## Dagurin

25. januar. Pálsmessa. Verður hildin til minnis um umvending Paulusar á leiðini til Damaskus í árinum 36. Á pálsmessu koma súlan og lomvigin at landi. Súludagurin er hátíðardagur í Mykinesi, og í eldri tíðum varð dansað har henda dagin . Erlendur biskupur var bispvígdur hendan dagin í 1269.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*